LM-031/2025

Brotsfrøðifelag Føroya

Løgtingsskjal 6.

10. okt. 2025

Ummæli Brotsfrøðifelags Føroya
um broyting í revsilógar § 50, stk. 1
Mál nr.: 25/22798

Ummæli um broytingar í revsilógar § 50, stk. 1

Brotsfrøðifelagi Føroya tykir skilagott, at sektir á føroyskum málsøkjum falla í landskassan og ikki í ríkiskassan. Tá ið tað snýr seg um milliónir, er enn týdningarmeiri, at hetta kemur í rætt lag.

Felagið lystir tó at vita, hvørt hesar sektarupphæddir verða markaðar. Gott hevði verið, um upphæddirnar fóru til brotsfrøðiliga gransking, fyribyrging, endurmenning ("rehabilitering") og útbúgving.

Vit vóna samstundis, at løgregla, brotsumsorgan og aðrir stovnar kunnu arbeiða betur eftir føroyskum viðurskiftum, mentan, siðum og samfelagi, hvørt hetta krevur, at hesir eisini koma á føroyskar hendur ella ikki.

Felaginum sýnist, at tað er av misgáum, at orðið "fella" verður nýtt heldur enn "falla". Felagið fegnast um, at orðið "ríki" verður nýtt heldur enn "statur".

Felagið skjýtur tí upp broyting í § 1, so at § 50, stk. 1 ljóðar: "Sektir falla til landskassans. Tó fara sektir fyri brot á lóggávu á óyvirtiknum málsøkjum og ferðslulóggávuna í ríkiskassan."

Við brotsfrøðikvøðu

Brotsfrøðifelag Føroya

Ingmar Berg Mikkelsen formaður

Daisy Iversen

Jógvan Kallsgarð Joensen

Maria Reynstind